

## Loreena McKennitt og Jóannes Lamhauge í Rás 2

Í Rás 2 hjá Miðlavarpinum mánadagin 10. des. kl.11.00 ber til at hoyra tónleik hjá Loreenu McKennitt, umframt brot úr samrøðuni við hana. Heri Simonsen tosar við Jóannes Lamhauge, sum var til konsert við kanadisku songkvinnuni í Keypmannhavn fyrr í ár. Nú ber eisini til at keypa tónleikin hjá Loreenu McKennitt í teimum størru fløguhandlunum í Føroyum.




*Loreena, Eivør, Lena og Guðrun hava allar sungið í Falkoner sentrinum. - Eg síggi fram til at syngja í Føroyum sigur Loreena McKennitt, sum her er avmyndað við síðuna av plakat av føroyskum songkvinnunum*

rómverjum – upp gjøgnum Evropa heilt út til evropeisku vesturstrendurnar. Teir høvdu við sær ein ómetaliga stóran mentanarligan dýrgrip av tónleiki, heimspeki, vísind, søgum og øðrum, ið teir hava sátt inn í mentaninar, ið teir komu fram á á ferðini. Og hesin ávøksturin kann so síggjast aftur ymsastaðni, um ein bert tímir at leita.

### Loreena um andaligan tørv

*Ert tú ein religiøsur persónur?*

- Eg fór seint í song í gjár, og kom ikki upp fyri enn klokkan gott tíggju í morgun, sum er stór skomm í mínari verð. Men eg fór so út at ganga mær ein túr, og tá eg hoyrdi kirkjuklokkurnar ringja, hugsaði eg , at eg skuldi fara í kirkju. Eg plagi at fara í kirkju av og á, og eg royni altíð at fara til allar tær religiøsu seremoniirnar og messurnar, sum eg komi fram á, tá eg ferðist.

Eg havi stóra virðing fyri øllum heimsins religiónum og religiónshugtakinum í heila tikið, og tí er spiritualitetur og tað andaliga ein stórur partur av tónleikinum hjá mær. Eg haldi, at vit menniskju hava ein frumbornan tørv á at vera andaliga gáin og hugfangaði, men sum øldirnar og túsundárini eru runnin er religiónin vorðin ein síðuúrdráttur av hesum andaliga frumtørvinum. Religiónirnar eru í flestum førum eisini vorðnar politiskt sporaðar, og í so máta er tað ikki heilt rætt at siga, at eg eri ein serstakliga religiøsur persónur, men eg havi í øllum førum ein stóran áhuga og eina stóra virðing fyri hesum andaliga tørvinum, ið vit øll hava.

*Hvør er drívmegin hjá tær sum listafólk, sum hevur gjørt, at tú hevur fingist við hetta øll hesi mongu árini?*

– Eg spyrji ofta meg sjálvan handan sama spurningin, tí tá eg vaks upp ætlaði eg mær so avgjørt at gerast djóralækni. Eg droymdi ongantíð um at gerast songkvinna, og eg hevði als ongan hug at gerast kend – og tað havi eg heldur ikki havt síðani. Tað, at ein hevur eitt kent andlit, er heilt einfalt nakað, ið er komið av sær sjálvum, meðan eg havi roynt at givið fólki mín tónleik.

Eg havi altíð elskað tónleik, og eg havi altíð verið innblandað í tónleikin, men mentalt havi eg so at siga altíð havt eina armslongd av frástøðu frá míni tónleikakarrieru, tí eg upprunaliga ongantíð ætlaði at gerast kend í einum slíkum samanhangi.

Tá eg vakni um morgunin, hugsi eg ikki, at eg havi eitt stórt navn sum so – eg eri sjálvandi takksom fyri, at eg eri komin so langt – men eg hugsi heldur um, hvussu eg fái brúkt tær gávur eg havi til at hjálpa so nógvum fólki sum gjørligt. Eg haldi, at eg eri heppin at vera so væl stødd at hava so nógvar resursur av øllum møguligum slagi at geva av, og at eg kann vera hjálpsom samstundis sum at halda áfram við at víðka mín egna andaliga sjónarring og mína egnu persónligu sjálvmenning.

Eg kundi eins væl sungið um okkurt heilt annað – hattar ella stólar t.d., men eg havi so rættiliga tíðliga í mínum lívi gjørt eitt óætlað val at nýta søguna hjá keltunum og tann keltiska tónleikin sum miðil fyri tí eg havi at bera fram. Men hóast hetta, havi eg ongantíð latið meg avmarka ella stýrt av hesum valinum eg havi gjørt, tí tann keltiska sjangran ella tann keltiski vegurin greinar seg út í so mong evni og temu, ið fanga mín áhuga, at eg altíð fari at hava eitt hav av møguleikum á míni ferð. Men harafturat skal so sigast, at hóast eg havi valt keltisku ferðina, vil eg vil ikki fráræna mær sjálvum møguleikan til at gerast hugtikin av heilt øðrum tingum, alt frá griskari mytologi til klassiskan skaldskap í bundnum og óbundnum máli – tí sum kinverski heimspekingurin, Lao Tzu segði: ”Ein sannur ferðandi hevur onga ferðaætlan, og hann hevur ikki komuna í huga.”

Sufistarnir høvdu eitt hugtak um at ”pussa sín sálarspegil”, og her haldi eg, at mín rødd verður tann pussandi ímyndin, sum er amboðið, ið hjálpir einum at úttrykkja tað, ið er mær ógvuliga íborið og grundleggjandi, og eg haldi, at júst hetta er ein partur av styrkini í tí, sum eg geri. Tú roynir ikki at hava nakrar forðingar ella nøkur mørk. Tú letur hurðarnar upp á víðan vegg og gevur soleiðis sálini frítt at fara.

### Loreena um Føroyar

*So eg skal skilja tað, sum at tað ikki bert er geografiska spennið á keltisku útflytanarleiðini, ið er eitt áhugavert ferðamál hjá tær? – kundi tú hugsað tær at komið til Føroya?*

– Nei, slett ikki. At ferðast hevur alt at siga fyri meg, og eg eri sjálvandi áhugaðð í øllum heimsins mentanum, men har eru tó heimspartar, ið eg ikki havi givið mær so góðar stundir til enn, sum India, Mið- og Suðurafrika og Suðuramerika, men tað er sjálvandi vónleyst at seta sær fyri at granska í øllum heimsins mentanum, tí tað nær ein jú ongantíð. Men har eru jú so mong spennandi ljóðføri, ið ein kemur fram á, sum ein kundi hugsað sær at vovið inn í tónleikin. Til dømis ætlaði eg at hava eina sokallaða ”mongolska rossahøvdafiól” við á seinastu útgávuni, An Ancient Muse, tí eg bleiv heilt forelskað, tá eg hoyrdi ein gamlan mann spæla á hetta undurfulla ljóðførið, tá eg var í Mongoliu herfyri, men hetta fingu vit tíverri ikki tíð til at gera til tá samanumkom.

Eg kundi so væl hugsað mær at komið til Føroya at vitja og at uppliva fólkið, sum búleikast har. Tað at møta fólkunum er ofta meginparturin av njótilsinum á eini konsertferð. Vit í bólkinum hava akkurát tosað um hatta, tí at ofta er tað soleiðis, at tá vit eru á konsertferð hava vit sjáldan tíð til at hyggja okkum um og at

*Framhald á næstu síðu*